# Vegleiðing og kunning um talgilda innlatan av ársfrásagnum sum PDF-fíla og XBRL-fíla til Skráseting Føroya umvegis Vinnugluggan hjá TAKS

Kunningin á okkara heimasíðu er soljóðandi:

*Frá og við 12. apríl 2017 skulu ársfrásagnir, ið skulu latast Skráseting Føroya, sum hava fíggjarstøðu tann **31.12.2016 ella seinni,** latast inn **bæði** sum PDF-fíla og XBRL-fíla umvegis Vinnugluggan hjá Taks. Freistin at lata Skráseting Føroya XBRL-fíluna fyri omanfyri nevndu ársfrásøgnir er innan 1. januar 2018. Frá 1. januar 2018 er freistin fyri at lata Skráseting Føroya XBRL-fíluna tann sama sum er galdandi fyri PDF-fíluna, og skulu fílurnar latast inn samstundis.*

***Hvørjar ársfrásagnir skal Skráseting Føroya hava í PDF-fílu og XBRL-fílu***

*Tær ársfrásagnir talan er um, og sum vanliga verða latnar Skráseting Føroya, eru fyri feløg í roknskaparflokki B, C og D, sum hava fíggjarstøðu tann **31.12.2016 ella seinni**.*

*Íverksetarafeløg, sum hava skyldu at lata inn ársfrásøgn til Skráseting Føroya, skulu tó framvegis bert lata inn í PDF-fílu og **ikki** XBRL-fílu.*

*Uppsetingin av XBRL-fílum og paring við taksonomi krevur ávísan kunnleika um roknskap og kunningartøkni.*

*Vit mæla tí feløgum til at venda sær til viðkomandi veitara fyri at fáa hjálp og vegleiðing.*

*Viðkomandi veitarar ið vit eru kunnaði um eru:*

- *XBRL.fo*
- *Góðkendu grannskoðanarvirkini, sí yvirlit á okkara heimasíðu yvir grannskoðaravirkir.*

*Aðrir møguligir veitarar eru KT-fyritøkur, bókhaldsvirkir og onnur líknandi virkir.*

## Vegleiðing til grannskoðarar og virkir:

- Ábyrgd
- Framløga, XBRL-standardur og PDF-fíla
- Taksonomi
- At lata inn

**Soleiðis virkar XBRL-standardurin í praksis**

At ein roknskapur skal latast inn í XBRL-standardi hevur við sær, at hann skal parast við eina taksonomi. Ein taksonomi er ein standardskrá yvir allar teigar, sum eiga at vera við í einum roknskapi. Vit hava gjørt eina slíka føroyska taksonomi, sum kann takast niður á www.vinnugluggin.fo > taksonomi. Hon hevur teigar til allar tær roknskaparupplýsingar, ið feløg skulu lata Skráseting Føroya.

Ítøkiliga skal hvør teigur í roknskapinum parast við samsvarandi teig í taksonomiini. Til dømis skal inntøkuteigurin í roknskapinum parast við inntøkuteigin í taksonomiini. Taksonomiin kann hava fleiri teigar enn teir, sum eru viðkomandi í roknskapinum hjá einum felagi, men bert viðkomandi teigar skulu nýtast.

Paringin av roknskapi og taksonomi verður vanliga gjørd í eini roknskaparskipan. Summar skipanir kunnu gera XBRL-fílur, men tær kunnu eisini gerast í forritum sum Word og Excel. Vanliga skal ein roknskapur bert gerast til XBRL-fílu eina ferð. Síðan kann sami leistur endurnýtast.

Uppsetingin av XBRL-fílum og paring við taksonomi krevur ávísan kunnleika um roknskap og kunningartøkni.

Vit mæla tí feløgum til at venda sær til viðkomandi veitara fyri at fáa hjálp og vegleiðing.

# Ábyrgd

**Hvat svarar innsendarin fyri?**

Innsendarin, sama um talan er um grannskoðaran ella lim í leiðsluni, svarar bert fyri, at ársfrásøgnin er góðkend á aðalfundi og at felagið hevur eitt eintak sum í minsta lagi er undirskrivað av fundarstjóranum og einum møguligum grannskoðara.

Leiðslan í felagnum hevur framhaldandi somu ábyrgd sum í dag. Tað er ábyrgdin hjá leiðsluni, at felagið hevur eintak av ársfrásøgnini, ið er undirskrivað av fundarstjóra, øllum leiðslulimum og møguligum grannskoðara.

**PDF-fílan mótvegis XBRL-fíluni.**

Tá ein ársfrásøgn verður latin inn gjøgnum Vinnugluggan, skal ein PDF-fíla og ein XBRL-fíla verða latin inn.

Til annað verður ásett er tað PDF-útgávan, sum er almenna ársfrásøgnin. Tað er PDF-útgávan, sum verður skrásett sum móttikin og almannakunngjørd av Skráseting Føroya.

Enn er eingin standardur framleiddur, sum ger tað møguligt hjá grannskoðaranum at úttala seg um rættvísandi mynd í XBRL-standardinum. Hetta er ein viðvirkandi orsøk til, at tað framhaldandi er neyðugt at lata inn eina PDF-útgávu av ársfrásøgnini.

Sjálvt um grannskoðarin úttalar seg við støði í PDF-útgávuni, hevur Skráseting Føroya valt at lata XBRL-standardin innihalda átekningina frá grannskoðara við tí endamáli at kunna greina.

## Framløga, XBRL-standardur og PDF-útgáva

**Hvussu stórur munur kann verða millum aðalfundar góðkendu ársfrásøgnina og XBRL-standardin?**

Sum útgangsstøði skal eingin munur verða. Myndir og uppseting kann verða á muni, við tað at myndir ikki eru partur av XBRL-standardinum.

Tað er loyvt innanfyri ásetingarnar í ársroknskaparlógini at leggja fram ársfrásøgnina í PDF-útgávuni við øðrum, og meira eyðkendum heiti enn í XBRL-standardinum.

**Hvat hendir, um ósamsvar er millum PDF-útgávuna og XBRL-útgávuna.**

Um roknskapar upplýsingarnar í PDF og XBRL-útgávuni ikki eru eins framborin, vil Skráseting Føroya venda sær til innsendaran fyri at kanna um talan er um tekniskan feil. Um grannskoðari er innsendari vegna felagið, setir Skráseting Føroya seg tó fyrst í sambandi við grannskoðarin.

Tað er tó altíð leiðslan í felagnum, ið hevur ábyrgdina av at lata inn ársfrásøgnina, og at tað innsenda er rætt.

**Kann tað verða munur á tekstlinjunum í taksonomiinini og teimum tekstlinjunum, ið framganga av tí roknskapi, ið eitt virkið skal lata inn í PDF?**

Stutta svarið er JA,

Roknskapar upplýsingar í einum prentaðum roknskapi verður altíð framborin í einum samanhangi, ið stuðla uppundir rætta tulking av einstøku upplýsingunum.

Tað sama er ikki altíð galdandi í sambandi við taksonominina, har tað kann verða tørvur á meira sigandi heiti, tá hesi ikki verða framborin í einum ávísum samanhangi.

**Myndir í ársfrásøgnini, ber tað til?**

Ársfrásøgnin skal latast inn gjøgnum Vinnugluggan (undantøk eru, sí innlatingarkunngerðina), har ársfrásøgnin verður latin inn bæði í PDF og XBRL. Tað er møguligt at vísa myndir í PDF-útgávuni.

Í PDF-útgávuni hevur innsendarin møguleika at vísa virkislogo, búmerki o.a.

**Hvat er at gera, tá talan til dømis er um frával av skemakravinum við tilvísing til rættvísandi mynd?**

Taksonomiin lýsir teir partar, ið virkið hevur møguleika at lata inn. Hon sigur sum so ikki nakað um hvussu ársfrásøgnin veður framborin.

Við at lata inn í PDF hevur felagið harvið møguleika at uppseta ársfrásøgnina á ein hátt, sum ger at rættvísandi mynd kann røkkast.

**Hvussu verður fyrivarni í átekningini frá óheftum grannskoðara merkt upp?**

Tá eitt møguligt fyrivarni í grannskoðaraátekningini skal merkjast upp, hevur tað týdning, at tað bert er sjálvt fyrivarni, ið framgongur av partinum “Fyrivarni”.

Sostatt skal ikki standa undir fyrivarni, at grannskoðanin ikki hevur givið orsøk til fyrivarni. Henda útsøgn hoyrir til partin “Ábyrgd grannskoðarans”.

# Taksonomi

**Hvat um taksonomiin ikki er dekkandi?**

Taksonomiin fevnir á sama hátt sum ársrokskaparlógin  fyri meginpartin av tí tørvi, ið feløg hava til val av roknskaparpostum.

Fyri feløg av serligum slag kann tað undantaksvís hugsast, at núverandi taksonomi ikki ger tað møguligt at geva eina rættvísandi mynd.

Í hesum heilt serligu førum, skal felagið søkja um undantøku at lata inn ársfrásøgnina í XBRL. Um Skráseting Føroya metir, at grundarlag ikki er fyri undantøku at lata inn ársfrásøgnina í XBRL, skal ársfrásøgnin latast inn í XBRL.

**Hvussu handfer Skráseting Føroya møguligar broytingar í ársroknskaparlógini í mun til taksonomi?**

Í tann mun talan er um broytingar í ársroknskaparlógini, vilja broytingarnar rættstundis verða settar inn í taksonomi.

Broytingar verða gjørdar í mun til gildiskomuna av lógarbroytingum sum ásett av løgtinginum.

Skráseting Føroya kunnar um møguligar broytingar í so góðari tíð sum gjørligt.

# At lata inn

**Nær er ein talgildur roknskapur latin inn rættstundis?**

Tá ársfrásøgnin er latin inn gjøgnum Vinnugluggan, verður ein kvittan fyri móttøku latin. Á kvittanini framgongur móttøkutíðin og er kvittanin samstundis prógv fyri nær ársfrásøgnin er latin inn. Kvittanin sigur einki um innihaldið og er sostatt bert ein kvittan um at fíla er latin inn.

**Á hvønn hátt verða kervis-óvirkni- og feilir viðgjørdir av Skráseting Føroya í mun til tíðarfreistir?**

Tá feilir er í skipanum til móttøku av ársfrásagnum (Vinnugluggin) verða allar tíðarfreistir fluttar soleiðis, at feilur í skipanum til móttøku ikki hava avleiðingar fyri innlatingina.

**Trupuleikar av at flyta til meginteldu (upload)?**

PDF-fílur kunnu til tíðir fylla nógv, tá talan er um ljóslesing (skanning). Stórar fílur kunnu viðføra trupulleikar tá flutt verður til meginteldu. Royn fylgjandi:

- Lata verða við at ljóslesa fílur í fotogóðsku. Vel heldur lægri góðsku.
- Lata verða við at ljóslesa fílur við undirskrift. Tað er ikki krav, at innsenda ársfrásøgnin er avritað við undirskriftum, tá ársfrásøgnin er latin inn talgilt.

OB 27.06.2017